# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## SØGAN UM STÓRA BRETAN

Nigel Knight hevur gjørt umfatandi kanningararbeiði av Wintson Churchill, sum leiddi Bretlandi undir seinna heimsbardaga, og hann sigur søguna um stóra leiðaran. Churchill var ein hetja, men hann gjørdi eisini nøkur stór mistøk, og hann var ofta í ringum lag. Nigel Knight hevur eisini gravað spennandi myndir fram av Churchill og hansara tíð.

**NIGEL KNIGHT**
Churchill: The Greates Briton Unmasked
David & Charles PLC



## UPPLIV LÍTLA DÍMUN

Fyrra ferðin út í Lítlu Dímun í summar verður hetta vikuskiftið. Í Dímun upplivir tú sólina seta og rísa, og sagt verður, at upplivingin er framúr góð. Avmarkað pláss er fyri ferðafólkum á ferðini. Meira fæst at vita á ldimun.com.

**LÍTLA DÍMUN**
Leygardagin 19/6-Sunnudagin 20/6



## SANDOYINGAR BJÓÐA TIL HUGNA

Leygardagin verður stórt tiltak á Sandi. Tiltakið verður rópt Føroya Vakrasti Familjufestivalur, og tað bjóðar nógvan góðan tónleik frá nøkrum av fremstu tónleikarunum í Føroyum. Millum annað fara Páll Finnur Páll, Terji Rasmussen, Jákup Veyhe & Kim Hansen, Guðrið Hansdóttir og Martin Joensen at spæla.

**FØROYA VAKRASTI FAMILJUFESTIVALUR**
Sandur
Leygardagin 19/6



## SHUTTER ISLAND

Í 1954 fara tveir løgreglumenn til Shutter Island fyri at finna ein sjúkling, sum er rýmdur av einum sinnissjúkrahúsi. Undir kanningararbeiðnum finnur annar løgreglumaðurin út av, at bæði starvsfelagi hansara og oyggin goyma loynidómar. Millum sjónleikararnar í filminum eru Leonardo Dicaprio, Mark Ruffalo, Ben Kingsley og Max von Sydow.

**SHUTTER ISLAND**
dvd-filmur
22/6



## SUMMAR-ROMANTIKKUR

Ein fartelefon, sum verður gloymd, er byrjanin til, at tann heldur kiksaði trygdarvørðurin Kirk hittir vøkru Molly. Og hóast øll halda, at tey bæði als ikki passa saman, kann tað verða, at tey gera tað alíkavæl. Ein romantiskur summarfilmur at stytta sær um stundir við.

**OVERSCORING**
Havnar Bio
Frá hósdegnum 17/6



## URÐARDANSUR Í KVÍVÍK

Leygarkvøldið kanst tú fara í eitt veruligt bygdaball í Kvívík. Har hava tey Urðardans. Dagurin byrjar við tiltøkum fyri børn og vaksin seinnapartin, og frá klokkan ellivu spæla klaksvíkingarnir Jákup Marnar Anthoniussen og Heini Ziska Dahl til dans.

**URÐARDANSUR**
Kvívíki
Leygarkvøldið 19/6 kl. 23.00



## STEVNA Í RUNAVÍK

Hetta vikuskiftið er Eystanstevna í Runavík. Har skipað tey fyri eini ørgrynnu av tiltøkum, Dansur verður við countrykonginum Hallur Joensen, og eisini er barnatiltak við Trølla Pætur, kappróður, karnivalur, boccia, fótbóltur og annað á skránni í Runavík í dag og komandi dagarnar.

**EYSTANSTEVNA**
Runavík
18-20/6